


*Hóast nógv er at gera á skaðastovuni á ólavsøkuni, so er tað stuttligt at vera til arbeiðis, tí fólk eru í góðum lag. Og prátið gongur væl í bíðirúminum*

# Stuttligt á skaðastovuni

**Tað er ymiskt, hvussu nógv fólk noyðast á skaðstovuna á ólavsøku. Men tey flestu eru í góðum lag, og tí kann tað vera stuttligt at arbeiða á ólavsøku, sigur Randi Gaard, sjúkrarøktarfrøðingur**

Randi Jacobsen
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á ólavsøku hendir tað meira enn so, at fólk detta, sláa seg í ella av aðrari orsøk noyðast á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum.

Men tað er ógvuliga ymist frá einum ári til annað, hvussu nógv fólkini eru, sum tørva hjálp fyri skaða. Og tað kann eisini vera nógv at gera annan dagin og lítið hin dagin.

Bæði tá ólavsøkukonsertin er, ólavsøkuaftan og ólavsøkudag er skaðastovnan betur mannað enn annars til at taka ímóti skaddum fólki.

Randi Gaard, sjúkrarøktarfrøðingur hevur nakrar ferðir upplivað at arbeiða á skaðastovuni á ólavsøku, og tað var ikki so galið, tí sjálvt um nógv kann vera at gera, eru starvsfólkini í ólavsøkulag.

Og tey, sum koma á skaðastovuna eru tey allarflestu eisini í góðum lag.

- Meginparturin er eitt sindur ávirkaður, og tey práta óført. Lagið plagar at vera sera gott í bíðirúminum, sigur Randi Gaard.

## Tey flestu ávirkað

Flestu skaðarnir henda, tí fólk hava drukkið ov nógv. Tey eru dottin ella hava stigið skeivt, og harðskapur er ikki óvanligur, um enn harðskapurin nokk ikki er so ráur á ólavsøku, sum hann kann vera til aðrar tíðir.

Um dagin plagar ikki at vera so nógv at gera.

Randi Gaard sigur, at Læknavaktin hevur lætt væl um trýstið á skaðstovuna, og tað hava samarittarnir so sanniliga eisini.

- Nógv fólk, sum fáa smærri snuddir, fara heldur til samarittarnar, tí tey vilja sleppa undan at fara úr býnum.

Heilt nógv fólk koma á skaðastovuna, tí tey hava drukkið ov nógv, og tað eru ikki bara ungfólk. Av tí, at tað er ólavsøka, fara tey ordiliga í býin. Men fleiri og fleiri ungfólk koma á skaðastovuna, tí tey duga ikki at drekka.

## Til oberservasjón

Nú er einki sum eitur at pumpa út fólk, sum hava drukkið ov nógv. Um tey á skaðastovuni halda, at tey fullu fólkini kunnu hava sligið høvdið í, verða tey løgd inn á bráðfeingis deildina til observasjón í 12 tímar. Eru tey bara full, verður syrgt fyri, at tey verða koyrd heim.

- Eru tey agressiv, ringja vit til politiið, og tey verða koyrd í detensjónina, men tað hendir ógvuliga sjáldan, sigur Randi Gaard.

Hon sigur, at samstarvið við politiið er gott. Politiið, sum hevur alarmesentralin 112, ringir, um onkur skal læknakannast, áðrenn viðkomandi fer í detensjónina, og skaðastovan ringir, um onkur fullur skal í detensjónina.

## Fleiri rúsevni

Tey uppliva meira enn so, at fólk koma á skaðastovuna og eru ávirkað av rúsevnum. Ofta upplýsa tey tað sjálv, tá ið tey koma við onkrum skaða. Summi eru doyvd, onnur meira aggresiv. Tað vindur meira uppá seg, at fólk koma á skaðastovuna ávirkað av rúsevnum, heldur Randi Gaard.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir á skaðastovuni eru væl mannaðir um ólavsøkuna. Ein møtir kl. 7 og arbeiðir til kl. 15, ein møtir klokkan 10 og arbeiðir til kl. 18, ein arbeiðir frá kl. 15 til 23, og tvær frá kl. 23 til 7.

- Summi halda, at tað má vera keðiligt at arbeiða a ólavsøku, men vit hava tað oftast stuttligt her, tí øll eru í so góðum lag. Tíðin flýgur avstað, tí vit hava fyri tað mesta nógv at gera. Einki við at sita niðri. Aftaná eina vakt á ólavsøku, eru vit rættiliga móðar, men tað ger einki, tí vit hava havt tað stuttlig og hava hitt nógv fólk, sigur Randi Gaard. Hon sigur, at er tað friðarligt ólavsøkuaftanskvøld, njóta vit at síggja fýrverkið hiðani. Útsýnið er gott, og nógvir bilar koma eisini út higar av tí sama at hyggja at fýrverkinum.

- Og útvarpið er frá, so vit kunnu hoyra útvarpsfólkini ganga úti og práta við fólk. Tað er hugnaligt, sigur Randi Gaard, sum hevur frí frá arbeiði hesa ólavsøkuna.

*randi@sosialurin.fo*

## Lítið av ráum harðskapi

Tá ið býurin er stúgvandi fullur av fólki í veitslulag, er ikki rúm fyri ráum harðskapi. Fólk ansa eftir hvør øðrum, sigur Johannes Mortensen, skurðlækni

Av tí at so nógv fólk eru í býnum á ólavsøku, slepst ikki undan, at nøkur fáa snuddir. Størri ella minni snuddir.

- Tá ið so nógv fólka saman, kann alt henda, og ung fólk hava lyndi til at detta, fáa snuddir ella skera seg.

Johannes Mortensen, skurðlækni hevur m. a. sæð nógvar koktar fótliðir og nógv skadd knø, men tað fær ikki verið øðrvísi, sigur hann.

Eftir at hava arbeitt sum skurðlækni á Landssjúkrahúsinum í fleiri ár heldur hann, at tað eru nógv fleiri tilburðir av ráum harðskapi allar aðrar tíðir á árinum enn á ólavsøku.

- Á ólavsøku fara fólk í býin fyri at hava tað stuttligt. Fyri mær er líkt til, at tað ber illa til at fremja ráan harðskap á ólavsøku. Býurin er fullur av fegnum fólkum, og tey ansa eftir hvør øðrum, sigur Johannes Mortensen.